# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801




# Opel Insignia Sports Tourer

**Opel Insignia sum hevur avloyst Opel Vectra, er nú eisini komin í stationcar útgávuni Insignia Sports Tourer**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Heðin Weihe*

Insignia Sports Tourer, sum er stationcar útgávan av nýggja Opel Insignia, er ein rættuliga stórur bilur við sportligum designi og kvaliteti á sera høgum støði.

Insignia Sports Tourer er 4,91 m langur og er sostatt 8 cm longri enn Insignia hatchback og sedan útgávurnar, sum komu fyrr í ár. Insignia fæst í trimum útgávum hvat útgerð viðvíkur: Essentia, Edition og Cosmo, sum er tann best útgjørdi.

Sports Tourer Insignia fæst við hesum bensinmotorum: 1,8 litra við 140, 1,6 litra turbo við 180 hk, 2,0 litra turbo við 220 hk og 2,8 litra V6 turbo við 260 hk, og við 2,0 CDTI dieselmotorum við ávikavist 110, 130, 160 og 190 hk.

Bilurin, sum vit royndarkoyrdu, var ein Sports Tourer við 1,6 litra við bensinmotori við turbo og 180 hk. Hesin er sera kvikur við einum snúningsmomenti upp á 230 Nm við 4.000 snún/min.

Opel Insignia Sports Tourer er ein framkomin bilur við nýggjastu motortøknini, aktivari trygd og umhvørvisvernd. Bilurin er stórur og rúmligur í allar mátar. Gott pláss til fimm ferðandi og teirra viðføri. Viðførisrúmið er 540 litrar.

Insignia verður gjørdur í Týsklandi á Opel verksmiðjuni í Rüsselsheim, sum er ein av mest modernaðu og framkomnu bilverksmiðjum í heiminum.

Opel Insignia kann síggjast og roynast hjá Auto Service við Oyggjarvegin. Prísirnir byrja við 290.000 krónum.



*Opel Insignia Sports Tourer er stationcar útgávan av Opel Insignia*





*Insignia Sports Tourer innan*



*Sum nakað nýtt hevur bilurin baklyktir innan fyri baklúkuna, sum lýsa tá baklúkan er opin*

## Opel Insignia Sports Tourer

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 1,6i bensin turbo við 180 hk |
| **Snúningsmoment** | 230 Nm við 4.000 snún/min |
| **CO2 útlát** | 184 g/km |
| **0-100 km/t** | 9,2 sek |
| **Bensinnýtsla** | 12,7 km/l (blandað koyring) |
| **Støðd og vekt:** | |
| Longd | 491,0 cm |
| Breidd | 186,0 cm |
| Hædd | 152,0 cm |
| Eginvekt | 1660 kg |
| Viðførisrúm | 540 litrar |
| **Prísur:** | kr. 382.500,- (Edition 1,6 turbo) |
| **Søluumboð** | P/F Auto Service<br>Við Oyggjarvegin<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 345400<br>www.autoservice.fo |

LESS IS MORE, LESS IS BETTER, LESS IS GENIUS.

motorstødd kraft

Superbilur frá Fiat



Eyðkennið fyri Bravo er at hann hevur flott design, er rúmligur, hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir, góðar koyrieginleikar og kvalitet á høgum støði.

**Prísur úr einans 178.000**

NORDCAR Smiðjugerði 4 · 100 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo

FIAT